Fáið gott óbindandi

TILBOÐ

Fyri eitt nú: Nýgerð, umleggingar ella umvælingar av øllum VVS-arbeiðum so sum:

HITAVERKUM
VATNLEGGINGUM
SANITETSARBEIÐUM

Okkara dugnaligu handverkarar arbeiða kring alt landið.

KELD PEDERSEN

Traðartún 8 - 160 Argir
Telf. 17785

Tey Grønu:

Krevja fólkaatkvøðu um øll almenn mál

Undir yvirskivtunum: »Heimsfevnandi felagsskapur — málið fyri eini langari menning, »Menniskja og samfelagið og Demokratisering av stjórn, kommununum og almennari umsiting«, siga Tey Grønu:

HEIMSFEVNANDI FELAGSSKAPUR — MÁLIÐ FYRI LANGARI MENNING

Upprunaliga var tað familjan, tann sosiali felagsskapur, ið tryggjaði frið og trygd hins einstaka. Síðani eru skaptir felagsskapir í smáum kongadømum og fúrstadømum til núverandi tjóðir. Endamálið má rímuliga verða, at vit skapa ein altjóða felagsskap, ið vissar øllum menniskjum frið og sosialan tryggleika.

Forfedrar okkara tóku av stríðið millum familjurnar. Vit mugu steðga kriggi. Foreldur okkara skaptu eitt sosialt trygdarnet, ið gjørdi okkum leys av treytini fyri figgjarvánum familjurnar. Vit mugu skapa eitt altjóða trygdarnet, ið ger hvønn einsakan leysan av treytini fyri figgjarráðnum tjóðarinnar.

Menningin er á slíkum støði í dag, at vit øll eru bundin at hvørjum øðrum. Hetta mugu vit gera okkum greitt.

MENNISKJA OG SAMFELAGIÐ

Vit standa í dag yvir fyri eini uppgerð um varðveitan og menning av fólkaræðinum og mannarættindunum. Sterkar kreftir ganga inn fyri stovnan av formyndara- og eftirlitssamfelagi.

Vit taka fult út undir við mannarættindaboðum STs. Tað er ein treyt fyri øllum grøna politikkinum, at mannarættindini koma øllum til góðar. Uttan hesi rættindi kann menniskjað ikki verja sína sosialu áhugamál, stríðast móti náttúrutýning og útvega sær betri arbeiðs- og livstreytir.

Rákið móti skerjing av teim demokratisku rættindunum er tó ikki nakað eindømi. Á óhugnaliga nógvum økjum: nýtslan av EDV, skapan av umfevnandi skrásetingum, skapan av almennum og privatum monopolum hóttir tey mest grundleggjandi sjónarmið fólkaræðisins. Vit seta okkum hart ímóti slíkum rákum og móti einum hvørjum hátti fyri kúgan í heiminum. Vit meta, at øll fólk hava eina persónliga ábyrgd, at tey grundleggjandi mannarættindini verða vird, og at vit øll hava skyldu at verja hesi rættindi.

DEMOKRATISERING AV STJÓRN, KOMMUNUM OG ALMENNARI UMSITING

Tað vaksandi skrivstovuveldið forðar møguleikum borgaranna at nýta politiska ávirkan og sjálvi seta tiltøk í verk. Tvørleikin, at finna út av almennu skipanini kemur bert politisku og figgjarligu seráhugamálunum tilgóðar og hóttir fólkaræði og almennu áhugamálunum.

Tískil krevja tey Grønu:

— tað ovurhonds stóra talið av nevndum, o.t., har áhugabólkar gera sær dælt, uttan at verða undir almennum eftirliti, skulu takast av, bæði innan lands- og kommunalt — miðspjaðing av politisku umsiting og almennari umsiting, eins og hálv- og heilaalmennum stovnum.

— rætturin til lokalt sjálvstýri og sjálvsumsiting skal viðkast.

— kommunur skulu sjálvar hava loyvi at útskriva skatt eftir sínum egnu reglum

— borgararnir skulu hava rætt og krevja fólkaatkvøðu viðvíkjandi øllum almennum málum.



Rúmt og trygt

-STÚTT Í NORRØNUM FARVATNI

HVØRJA VIKU
Vlissingen: Mánadag
Middelfart: Mikudag
København: Hósdag
Aalborg: Friggjadag

AÐRU HVØRJA VIKU
Grimsby Drammen
Halmstad

REGLULIGA
Trondheim
Aalesund
Vasa

STAR SHIPPING
POSTSMOGA 103 • FR 110 TÓRSHAVN
TLF. 14980 • TELEX 81215 • TELEFAX 15926

Lýsið í sosialinum

Montørar til viðskiftadeildina

Til okkara installatiónsdeild í Tórshavn søkja vit eftir 4 dugnaligum montørum.

Títt starvsøki
Tú kemur í fyrstu tíðina at fáa útbúgving innan monterings- og kaðalarbeiði og at arbeiða saman við vándum monterum.
Seinni verður útbúgving innan vekslaramontering givin og kemur tú at starvast neyvt saman við okkara PABC-teknikarum.

Tín útbúgving
Vit kundu hugsað okkum at tú hevur útbúgving sum elektrikari, men fólk við aðrari útbúgving og fólk við serligum gávum til slíkt starv, hava eisini áhuga okkara.

At tú:
— kanst arbeiða sjálvstøðugt,
— hevur lætt við at tosa við fólk,
— hevur evni at samarbeiða
og at tú hevur áhuga fyri at gera eitt gott arbeiði — eisini tá ástendur.

Vit kunnu bjóða
eitt sjálvstøðugt arbeiði í einum umhvørvi í støðugari menning.
Góðar møguleikar fyri viðari útbúgving innan starvsøkið.
Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið ella Teknikarafelagið.

Er tú áhugaður?
So ring til tlf. 1-1433 lok 325 og hoyr um stamið
ella send umsókn tína til:

TFL FØROYAR

Postsmoga 27
FR-110 Tórshavn